


*Nr. 3* *3. februar 2013* *73. árg.*

# Vit boða Kristus krossfestan

*Men av tí at bæði jødar krevja tekin og grikkar søkja vísdóm, men vit boða Kristus krossfestan.*
*Kor. 1,22-23*

Vit eru í ætt bæði við jødar og grikkar. Vit vilja fegin síggja tekin og søkja vísdóm. Men skal gleðiboðskapurin rína við hjá okkum, mugu vit geva fornuftini boð um, at hon klárar ikki lívsins størstu spurningar. Við krossin mugu tankarnir setast til viks, og í staðin kemur undranin um Guds órannsakiligu vegir.

Skal Gud fáa okkum í talu, mugu vit fyrst avvápnast. Í gomlum døgum løgdu menn vápnini frá sær í forkirkjuni, áðrenn farið varð inn í kirkjuna. Tá ið vit lesa tey fýra evangeliini, sæst klárt, at tað bara er eitt slag av menniskjum, sum Jesus ikki fekk hjálpt. Tað vóru tey, sum hildu, at tey kláraðu seg sjálvi. Svong mettar hann við góðum gávum, men tey sum halda seg vera rík, rekur hann burtur við tómum hondum.

Skal samband knýtast millum Gud og okkum, mugu vit í álvara viðganga, at vit koma ikki uttan um Guds miskunnsemi. Ofta eru vit meira upptikin av at fáa Guds hjálp, tá ið vit eru í neyð, enn av at taka ímóti Guds frelsandi náði. Hjálp er fyri okkum størri og týdningarmeiri enn frelsan. Tí er ofta torført at fáa samband í lag.

Latið okkum taka uppaftur, at treytin fyri eini avklåring í trúnni er, at vit verða avvápnað og gerast heft at Gudi. Latið okkum leggja afturat, at henda avklåring er ein gongd, sum heldur fram hvønn dag, alt lívið.

Teknið er givið, men tað er givið í krubbuni í Betlehem og í krossinum á Golgata. Tí verður hetta altíð ein dárskapur fyri tey, sum halda, at fornuftin eigur at hava harradømið, og eru hugtikin av valdi hennara. Men fyri tey, sum vilja verða frelst, er orðið um tann krossfesta og upprisna Harran Jesus Kristus tað einasta, sum gevur hjartanum frið.

*Tú kemur ei uttan um Jesus,*
*hann lívið og sannleikin er –*
*ein viti á náttmyrka firði,*
*tann leið, sum til paradís ber.*

*Tú kemur ei uttan um Jesus –*
*hitt dýrasta navnið, ið er,*
*í lívi, í deyða og dómi*
*tað einasta navnið, ið ber.*

*So gev nú títt hjarta til Jesus,*
*hann læt jú sítt lív fyri teg!*
*Um gøtan er trong, hann teg leiðir,*
*so ber hon tó sælasta veg.*

# Í Guds ferðalagi

*Er Gud við okkum, hvør er tá ímóti okkum? Róm. 8,31.*

Tað er Paulus, sum sigur hesi orðini í brævi til tey kristnu í Rom, eftir at hann í kapitlinum frammanundan hevur talað um Guds undurfullu náði í Kristi Jesusi. Paulus eins og ger upp úrslitið og leggur dent á, at er Gud við okkum, kann ongin gera okkum nakað. Gaman í eru nógvir fíggindar og mong, sum standa ímóti okkum; men er Gud við okkum, tá skal hann vinna og sigra.

Hetta er eitt vælsignað orð, og hvussu troystarríkt er tað ikki, at kunna bera tað fram á vørrum okkara; men eru vit før fyri hesum? Tora vit veruliga at trúgva og hvíla í, at Gud er við okkum?

Av natúru eru vit vreiðinnar børn og als ikki við Gudi, men ímóti Gudi. Soleiðis standa mong fyri ásjón Guds og faðir Jesu Krists. Tað eru ikki bara øll, sum opinlýst avnokta Gud og forfylgja honum og soleiðis vísa, at tey eru ímóti Gudi. Tað eru eisini mong hampilig og rættskaffin menniskju, sum – tó at tey eru heiðurlig – kortini hava Gud ímóti sær, tí at hjarta teirra er kalt og brýggjar seg ikki um frelsuna í Jesusi Kristi.

Hvussu fært tú tá Gud við tær? Á tann hátt, at tú heldur við honum. Tú mást av fullum hjarta kvitta við hitt gamla lívið í synd og øll tey, sum standa ímóti Gudi, og tú skalt venda tær til hansara, sum ikki spardi son sín, men gav hann fyri okkara skyld – eisini tína. Tú mást ongantíð bíða, at tú megnar at fáa Gud at venda um ella at halda við tær. Nei, tú mást venda um, um tú skalt fáa Gud at halda við tær.

Tað kann gerast ógvuliga torført at bretta hitt gamla av sær, og tað tykist mangan, eins og nógv fleiri eru ímóti Gudi enn við Gudi; men fast sum í berginum stendur, at bara tey, sum hava Gud við sær, skulu fáa lut í hinum endaliga sigrinum, verða fríkend fyri Guds dómstóli fyri Jesu Krists skyld og fáa eitt ævigt lív.

So má tað kosta tað, sum tað kostar, sál mín má verða frelst. Ver støðufastur við Jesu lið og bið hann frelsa teg.

Tá skal hann, sum ikki spardi onkason sín, taka ímóti tær í navni sonarins, og er himmalsins Gud við tær, hvør er tá ímóti tær? Lat so ódnirnar leika, aldurnar gerast fjallhøgar, er Gud við okkum, tá skulu hvørki ódn ella aldur týna okkum.

Og kemur allur tann herurin, sum stendur ímóti Gudi, ímóti okkum, og høvdingin í hesum heimi gongur á odda, tá skal hann onki fáa gjørt um seg, um Gud er við okkum.

O, sum tað er trygt og sælt, at Gud er við okkum!

*Tí fjakka lættur fótur mín,*
*eg leiti mær, mín Gud til tín,*
*tú leiðir meg á lívsins veg;*
*mítt álit alt tað er á teg;*
*tí kunnu ongi ilskubond*
*meg toga burt úr tíni hond.*

*t.* týddi.

# Uppreisnarvónin

*Tí at um vit trúgva tí, at Jesus er deyður og risin upp, tá skal Gud eisini somuleiðis við Jesusi leiða tey fram, sum sovnað eru burtur, saman við honum.* *1. Tess. 4,14*

Eitt orðafelli ljóðar: „Hugsa um, hvussu stutt lívið er, hvussu vissur deyðin er, og hvussu langur ævinleikin er.” Púra vist er, at vit øll einaferð skulu doyggja, um Jesus ikki er komin aftur áðrenn. Vit liva uttan fyri Paradísið, har synd og deyði ráða.

Vit leggja okkara deyðu í eina kistu og bera tey til gravar. Kistan verður sigin niður í grøvina og skumpað verðu útyvir. Kanska verður leiðið prýtt og ein gravsteinur reistur. Tann farni hvílir í „urtagarði teirra deyðu.“ Men hóast nógvir kirkjugarðar síggja vakrir út, er deyðans veruleiki beiskur. Hart er at liva við sakninum um ein kæran hjúnafelaga ella eitt barn.

Men áðrenn farið verður út á grøvina í kirkjugarðinum, hava vit verið í kirkjuni og játtað trúnna : Vit trúgva á uppreisn likamsins og ævigt lív.”

Hvussu øvugt hetta so ljóðar í mun til tað, sum vit síggja í natúruni, so trúgva vit á uppreisn likamsins. Vit trúgva, at deyð gerast livandi aftur. Tað er kristna vónin, ikki ein vón tikin úr tí bláu luft, men ein vón í Kristi. Gud sendi son sín í heimin at stríðast

móti deyðanum og djevlinum, og hann vann. Við trúnni fáa tey, sum fingu krossmerkið rist fyri andlit og bróst, lívið sum eina æviga gávu!

Eins og Jesus doyði og reis upp, letur Gud eisini øll, sum sovnað eru burtur í trúnni á hann, rísa uppaftur. Vit skulu ikki verða verandi í ”urtagarði teirra deyðu.” Guds mál er at leiða okkum heim aftur í ”Paradís-urtagarðin.” Og har sleppa vit at vera saman við Jesusi, okkara frelsara og undangongumanni.

Tað verður ein dagur, tá ið hetta hendir, og lív aftur kemur í kirkjugarðarnar

*Tú til lívs meg upp skalt vekja,*
*tað er tín uppreisnar náð;*
*lat tey leiðið um meg tekja,*
*lat meg vera maðka bráð,*
*lat mær gloypa eld og sjógv,*
*eg í trúgv tó og í rógv*
*doyggi, tí úr deyðans londum*
*bjargist eg av tínum hondum.*

# *Hvat skal eg velja?*

Tá ið eg fari undir okkurt nýtt og ókent, so leggi eg tað fram fyri Gud í bøn. Orðið sigur: “Við gleði skulu tit fara avstað og í friði verða fylgd á veg.” Jes. 55,12. So kanni eg eftir, um tað eru gleðin og friðurin, sum hava ræðið í mínum innara menniskja. Valdar ófriður í hjartanum, sleppi eg tí, tí gleðin og friðurin eru eyðkenni, har Gud staðfestir, at eg eri á rættari leið.

*e.c.* ums.

---

Materialisman oyðileggur Evropa. Fólk hava ikki longur brúk fyri at biðja: “Gev okkum í dag okkara dagliga breyð.” Tað, sum skuldi vera ein signing, er vorðið til banning, tí bønin er andadrátturin í gudsbarnalívinum. Gevst tú at anda, so doyrt tú! Soleiðis er tað bara.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 3.febr. | Tekstur: | Matt. 5,1; 7,1-6+12. Mark. 6,30-31; | bíbliuorð: | Matt. 7,12 |
| 10. febr. | Tekstur: | Matt. 4,1-11 | bíbliuorð: | Matt. 4,10b |
| 17. febr. | Tekstur: | 1.Sám. 9,2+15-17+21-23; 10,1+5-10; 11,15; 13,9-14; | bíbliuorð: | 1. Sám. 3,9 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74